


# Studieorlov

Við hesum verður sagt prestunum frá, at biskupsdømið hevur pening til, at ein prestur kann fara í lestrarfarloyvi (studieorlov) í 3 mánaðir.

Tænastufrælsið verður goldið við peningi úr puljuni, soleiðis at presturin, so leingi tænastufrælsið varir, fær eina serliga førleikaviðbót, sum er á hædd við lønina. Serliga viðbótin verður útgoldin hvønn mánað í farloyvistíðini. Tænastufrælsið verður ikki talt upp í lønar- og starvsaldurin.

Starvið verður í farloyvistíðini røkt av fyribils settum avloysara.

**Við tillutan av lestrarfarloyvi verður dentur lagdur á:**
- lestur, sum hevur gudfrøðiligan og kirkjuligan týdning
- tænastualdur
- persónlig viðurskifti
- at umsøkjarin ikki áður hevur fingið lestrarfarloyvi.

Umsóknin skal stílast til Føroya Biskup og sendast tænastuvegin. Frágreiðing um endamálið við lestrinum og avrit av seinastu lønaruppgerð verða løgd við.

Umsóknin skal verða dómpróstinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. juli 2007 kl. 15.00.

**Føroya Biskupur**
*Hans Jacob Joensen*

# Mótahandil til sølu

- Handilin er í støðugari framgongd
- Umboðar tey kendastu merkir
- Liggur væl fyri í miðbýnum
- Góðan kundaskara

Vil tú hava avbjóðingar er hetta ein góður møguleiki.

Meira fæst at vita við at venda sær til tlf 522680 ella á mail diva@kallnet.fo



Diva

# Venjingarskúlin

handan Á 14 · 100 Tórshavn

## Søkt verður eftir 2 lærarum

- 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/08 at lesa avlopstímar (endaliga tímatalið verður ikki greitt fyrr enn 1. september 2007)
- 1 lærara frá 16. august til umleið 1. februar 2008 fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

Fyrimun hava tey, sum kunnu undirvísa í:

Ítrótti, alis-/evnafrøði, tónleiki, máli

– og sum hava læraraútbúgving, hava góð samstarvsevni, eru opin, kreativ, vilja vera við til at menna skúlan, og sum eru sinnað at arbeiða í sjálvstýrandi toymi!

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita um størvini við at seta seg í samband við varaskúlastjóran, Katrin Ellingsgaard, á tlf. 213503.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 13. juli á middegi.

Í Venjingarskúlanum verða komandi skúlaár umleið 450 næmingar í 19 flokkum og her koma at starvast 37 fólk. Lærararnir eru skipaðir í 5 sjálvstýrandi toymi: 1.-3. fl., 4. og 5. fl., 6. og 7. fl., 8-10 fl. og sertoymi. Skúlin húsast í trimum bygningum: 1. og 2. flokkur halda til á Ytra skúla við Landavegin, 3. fl. á Heimara skúla við Fr. Petersens gøtu og 4.-10. fl. eru í skúlanum á Stórheyggi.

# Til sølu

**Garaguhurð av slagnum Windsor til sølu**



Áður nýtt til ein virkisbygning.

Hurðin er styrkt, og mátar 4,2 x 3,8 m

Áhugaði kunnu ringja til Eyðfinn á telefon 350 350

**Føroya Termovirki P/F**
Sundsvegur 8 · FO-100 Tórshavn

FØROYA PEDAGOGFELAG

# Summarfrí

**Felagið hevur stongt vegna summarfrí**

| | |
|---|---|
| Vik 28 | 9. juli – 13. juli |
| Viku 30, 31, 32 | 23. juli – 13. aug. |

**Føroya Pedagogfelag**

Søkt verður eftir royndum

## førara til FURUKAWA HCR 1200 borivogn við húsi

Til veg- og lendisarbeiði.

Áhugaðir kunnu venda sær til skrivstovu okkara ella til Jón Danielsen á tel. 210683.

ARTICON
**á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn**
**tel. 350700 · fax 350705**

Søkt verður eftir royndum

## MASKINFØRARA

Til veg- og lendisarbeiði.

Áhugaðir kunnu venda sær til skrivstovu okkara ella til Jón Danielsen á tel. 210683.

ARTICON
**á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn**
**tel. 350700 · fax 350705**



# Skúlaheimið

## Vit hava veitsluhøli til leigu

Hølini eru væl egnaði til eitt nú brúdleyp, veitslur og familju samkomur.

**Ring 589999**

**Skúlaheimið í Marknagili**

Marknagilsvegur 75 · Postboks 3239 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 308050 · Fax: 308051 · T-postur: tst@tst.fo

Lesið **Sosialin** -so eru tit við!